


bæði til børn og vaksin

fáast í 18 ymiskum litum



# CROCS skógvar

## Vit hava nú fingið teir kendu CROCS skógvarnar.

CROCS hóska seg væl til bæði arbeiðs- og frítíðarbrúk og eru t.d. nógv nýttir á sjúkrahúsum og stovnum, har brúk er fyri tryggum og sterkum skóm, ið eru góðir at ganga í.

## 10 góðar grundir at velja CROCS skógvar

- Teir eru bleytir, og góðir at ganga í
- Teir laga seg eftir fótinum
- Teir hava ortopædiskt snið
- Teir eru sera lættir
- Teir eru mótstøðuførir móti bakterium og lukti
- Teir eru ventileraðir
- Teir eru glíðitryggir
- Teir hava cool italienskt snið
- Teir kunnu steriliserast við klori
- Teir eru lættir at vaska

Verður keypt av netinum á ergo.fo, verður latið **10%** í avsláttri!

Sosialurin 34 18 00



ergo.fo

J.C. Svabosgøta 6 · FO-100 Tórshavn · Tlf 315 777 · Fax 315 772 · ergo@ergo.fo · www.ergo.fo

---

Klaksvíkar Kommuna I Svimjihøllin

# Leiðari til Klaksvíkar Svimjihøll

**Eftir 25 ár í starvi í svimjihøllini fer verandi svimjihallarleiðari, Kári Kjelnæs, tann 10. september 2006 frá fyri aldur.**

Klaksvíkar Svimjihøll stendur í dag framman fyri nógvum nýggjum avbjóðingum:
- Heilsa og likamsrøkt fær alsamt størri týdning í vælferðarsamfelagnum, og gevur hetta svimjihøllini eina serliga ábyrgd og møguleikar at bjóða fólki møguleikar fyri rørslu aftur við góðum upplivingum í einum spennandi, hugnaligum og tryggum umhvørvi,
- Norðoyatunnilin hevur latið upp fyri heilt nýggjum møguleikum og marknaðum í einum munandi størri lokaløki, sum stendur svimjihøllini frítt at gagnnýta og gerast ein miðdepil, og
- Sjøtil er settur á fyrstu partarnar av eini spennandi útbyggingarætlan, sum m.a. fevnir um skreiðibreyt og vatnland – seinni eisini heittvatnsumhvørvi og gosbað.

**Til at stjórna, selja og vera við til at menna Klaksvíkar Svimjihøll til at møta nevndu og mongum øðrum avbjóðingum í framtíðini, verður søkt eftir nýggjum svimjihallarleiðara at byrja í næstum.**

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- At stjórna, selja og vera við til at menna tilboðini í svimjihøllini.
- At tryggja eitt til eina og hvørja tíð trygt, reint og dámligt umhvørvi í høllini
- At hava ábyrgd av dagliga virkseminum, m.a. yvir fyri starvsfólkum og viðskiftafólkum, tekniskt og fíggjarliga.

**Aðrar uppgávur eru:**
- Í hóskandi og neyðugan mun at luttaka í vaktarskipanini í høllini.
- At samskifta við viðskiftafólk o.o. og á tann hátt at dagføra sína vitan um brúkarans tørv og ynski.
- At finna og skapa møgulig hóskandi nýggj tilboð til viðskiftafólk í høllini, herundir eisini møguligar nýggjar virkis- og inntøkumøguleikar.
- At skipa fyri møguligum tiltøkum til frama fyri fólkaheilsuna og annars umhvørvið í svimjihøllini.
- At fylgja við og kunna seg um menning, sum fer fram á økinum.
- At samstarva við aðrar svimjihallir, bæði innan- og uttanlands, um felags mál.
- At vera við í framhaldandi planleggingini av svimjihøllini og leikluti hennara sum heild, herundir møguligar um- og útbyggingar.

**Vit søknast eftir persóni, ið:**
- Hevur hugsjónir um virksemi í eini svimjihøll.
- Hevur neyðugan kunnleika og fortreytir fyri at hava ábyrgd av svimjihøllini.
- Kann ganga á odda og arbeiða sjálvstøðugt.
- Dugir væl at fyrisita og leiða.
- Kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.
- Dugir at samskifta innan- og uttanhýsis.
- Hevur náturligan myndugleika og ein hóskandi leiðslustíl.
- Hevur góða heilsustøðu.

**Útbúgving/førleikar:**
- Teknisk útbúgving og/ella hóskandi royndir/vitan kann geva fyrimun, vísandi til at nógv teknisk útgerð og skipanir eru í svimjihøllini.
- Lívbjargararoynd og fyrstuhjálparprógv. Skipað kann eisini verða fyri hesum royndum í sambandi við setan.
- Helst royndir innan leiðslu og samstarv.
- Kunnleiki til EDV er ynskiligur.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi arbeiði við nógvum avbjóðingum.
- Møguleikar og ábyrgd av at mynda svimjihøllina.

**Setanarviðurskifti:**
- Talan er um eitt fulltíðarstarv.
- Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF) og Starvsmannafelagið, lønarflokkur 5.
- Hevur tilvísing til Mentanardeildina
- Verður at tola møguligar bygnaðarbroytingar.
- Fyrsta árið er royndarár.

**Fleiri upplýsingar**
fáast við at venda sær til býráðsskrivaran ella mentanardeildarleiðaran á tlf 410000. Umsóknir, saman við prógvi, heilsuváttan og møguligum viðmælum v.m., verða at senda til:

**KLAKSVÍKAR BÝRÁÐ**
**Postsmoga 2**
**700 Klaksvík**

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi á middegi **mánadagin 14. august 2006**

**Klaksvíkar Svimjihøll:**
Er ein av íalt trimum svimjihallum í landinum, sum hevur 25 metra svimjingarhyl. Inniheldur annars barna- og familjuvinarligt umhvørvi við grunnum hyli við ymiskum lutum at spæla við, hitarúm v.m.
Varð bygd í 1974. Er í løtuni undir um- og nýbygging og fer seinni í ár at lata upp við tí fyrstu, stóru skreiðibreytini í landinum, vatnlandi v.m.
Umframt leiðaran eru fýra starvsfólk í føstum starvi umframt eitt ávíst tal av avloysarum.

creδ 458006

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I klaksvik.fo